# Leiðreglur fyri at veita verkætlanarstuðul til mentan og list

## Yvirskipað endamál fyri mentanarstuðli Tórshavnar býráðs

Mentanarstuðul Tórshavnar býráðs hevur til endamáls at vera við til at:

- Stuðla mentanarlívinum í allari kommuni og menna tað.
- Tryggja burðardygg arbeiðskor (fíggjarlig, menniskjalig, sosial) til tey, sum arbeiða við list og mentan í kommununi.
- Fremja eitt fjøltáttað mentanartilboð til allar borgarar í Tórshavnar kommunu.

## Verkætlanarstuðul – mentan og list

Øll, sum skipa fyri mentanarligum og/ella listaligum verkætlanum, og sum uppfylla treytirnar niðanfyri, kunnu søkja um verkætlanarstuðul frá Tórshavnar kommunu.

Søkjast kann antin um »Vanligan stuðul«, sum er til umsóknir á upphæddir ímillum 20.000 og 100.000kr, ella »Snarstuðul«, sum er til umsóknir á upphæddir á í mesta lagi 20.000 kr.

## VANLIGUR STUÐUL

### §1 Endamál

Stk. 1. Endamálið við vanligum stuðli er:

- At tryggja dygd og menning.
- At stuðla øllum lista- og mentanargreinum.
- At virka fyri fjølbroytni og inklusjón í breiðari merking.

### §2 Treytir

Stk. 1. Umsóknir verða viðgjørdar eftir fylgjandi treytum:

- Dygd.*
- Menning (t.d. talentmenning, menning av listagreinini, menning av miðlan, áskoðaramenning, nýskapan).
- Hvussu umsóknin stuðlar uppundir visjónina, virðisgrundarlagið og viðkomandi politikkir hjá Tórshavnar Kommunu.
- Tónleikaútgávur (søkjast kann um Snarstuðul til hesar).

Stk. 3. Upphæddin, søkt verður um, kann í mesta lagi vera 50% av samlaðu fíggjarætlanini fyri verkætlanina.

Stk. 4. Søkjast kann um í minsta lagi 20.000kr og í mesta lagi 100.000kr (umsóknir um hægri upphæddir verða vístar til stuðulsmøguleikan »Stuðul til størri listaligar verkætlanir«, sum hevur freist 1. apríl á hvørjum ári. Til lægri upphæddir skal søkjast um snarstuðul).

Stk. 5. Stuðul verður ikki latin til:

- Verkætlanir, sum eru farnar í gongd, ella eru lidnar, tá umsóknarfreistin er.
- Verkætlanir, sum kommunan ikki hevur heimild til at stuðla sambært kommunufulltrúini (t.d. verkætlanir, sum ikki eru til gagns fyri borgarar í Tórshavnar kommunu; vinnuligar verkætlanir; átrúnaðarligar ella politiskar verkætlanir).
- Uttanlandsferðir (listafólk kunnu søkja um stuðul til ferðing frá Loftbrúgv til listafólk, sum Tórshavnar kommuna er partur av).
- Skúla- og útbúgvingarverkætlanir (herundir eisini musikkskúlaverkætlanir).
- Verkætlanir hjá almennum stovnum.
- Frítíðarvirksemi sum t.d. ítrótt og skótar (serstakur stuðulsmøguleiki er til tað endamálið).
- Rakstur.

**Orðið »dygd« verður her tulkað í breiðastu merking, har tað ikki einans merkir góðska, men eisini virði og týdningur fyri t.d. listagreinina, mentanarlívið, borgaran, nærumhvørvið og kommununa. Tað merkir listalig dygd, samfelagslig dygd, mentanarlig dygd, og kann ikki metast uttanfyri samanhang.*

**§3 Viðgerð og freistir**

Stk. 1. Fyrisitingin ger tilmæli um, hvør fær stuðul og hvussu nógv, og leggur hetta fyri mentamálanevndina til viðgerðar.

Stk. 2. Tríggjar umsóknarfreistir eru um árið, og viðgerðin í mentamálanevndini er í fylgjandi mánaði eftir freistina. Freistirnar eru hesar:

1. mars (verður viðgjørt miðjan í apríl og svar sent síðst í apríl).

1. september (verður viðgjørt miðjan oktober og svar sent síðst í oktober).

1. desember (verður viðgjørt miðjan januar og svar sent síðst í januar).

**§4 Játtan og útgjald**

Stk. 1. Ávís upphædd verður avsett til hvørt umsóknarumfar, treytað av fíggjarætlanini fyri árið, og møguligt avlop frá hvørjari rundu verður lagt afturat seinni rundu(m) ella flutt yvir á annan stuðulstátt.

Stk. 2. Stuðulin verður útgoldin eftir umbøn frá umsøkjaranum, tá skjalprógv fæst fyri, at verkætlanin verður framd.

Stk. 3. Stuðulsjáttanir eru galdandi í 12 mánaðir frá degnum, stuðulin er játtaður. Eftir hetta fellur stuðulin burtur uttan ávaring.

## SNARSTUÐUL

### §1 Endamál

Stk. 1. Endamálið við snarstuðlinum er:

- At fostra kreativitet og nýskapan.
- At tryggja breiða atgongd til stuðulsmøguleikar og harvið eisini inklusjón.

### §2 Treytir

Stk. 1. Umsóknir verða viðgjørdar eftir fylgjandi treytum.

- Dygd.*
- Menning (t.d. talentmenning, menning av listagreinini, menning av miðlan, áskoðaramenning, nýskapan).
- Hvussu umsóknin stuðlar uppundir visjónina, virðisgrundarlagið og viðkomandi politikkir hjá Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Søkjast kann um í mesta lagi 20.000kr.

Stk. 3. Stuðul kann latast til:

- Uppstart og/ella menning av verkætlanum (herundir eisini hugskotsmenning).
- Smærri verkætlanir.

Stk. 4. Stuðul verður ikki latin til

- Verkætlanir, sum eru farnar í gongd, ella eru lidnar.
- Verkætlanir, sum kommunan ikki hevur heimild til at stuðla sambært kommunufulltrúini (t.d. verkætlanir, sum ikki eru til gagn fyri borgarar í Tórshavnar kommunu; vinnuligar verkætlanir; átrúnaðarligar ella politiskar verkætlanir).
- Uttanlandsferðir (listafólk kunnu søkja um stuðul til ferðing frá Loftbrúgv til listafólk, sum Tórshavnar kommuna er partur av).
- Skúla- og útbúgvingarverkætlanir (herundir eisini musikkskúlaverkætlanir).
- Verkætlanir hjá almennum stovnum.
- Frítíðarvirksemi sum t.d. ítrótt og skótar (serstakur stuðulsmøguleiki er til tað endamálið).
- Rakstur.

**Orðið »dygd« verður her tulkað í breiðastu merking, har tað ikki einans merkir góðska, men eisini virði og týdningur fyri t.d. listagreinina, mentanarlívið, borgaran, nærumhvørvið og kommununa. Tað merkir listalig dygd, samfelagslig dygd, mentanarlig dygd, og kann ikki metast uttanfyri samanhang.*

**§3 Viðgerð og freistir**

Stk. 1. Ongin umsóknarfreist er til snarstuðul, men umsóknir skulu vera umsitingini í hendi, áðrenn verkætlanin fer í gongd.

Stk. 2. Umsitingin viðgerð og tekur avgerð um snarstuðul samsvarandi treytunum í hesum leiðreglunum.

Stk. 3. Miðað verður eftir, at umsøkjarar fáa svar innan 6 vikur, eftir at umsóknin er móttikin.

Stk. 4. Mentamálanevndin verður kunnað um snarstuðulsjáttanir í minsta lagi eina ferð um árið.

**§4 Játtan og útgjald**

Stk. 1. Ávís upphædd er avsett til snarstuðul hvørt ár, treytað av fíggjarætlanini fyri árið.

Stk. 2. Stuðulin verður útgoldin eftir umbøn frá umsøkjaranum, tá skjalprógv fæst fyri, at verkætlanin verður framd.

Stk. 3. Stuðulsjáttanir eru galdandi í 3 mánaðir frá degnum, stuðulin er játtaður. Eftir hetta fellur stuðulin burtur uttan ávaring.

## Aðrar yvirskipaðar treytir

Stk. 1. Mentamálanevndin kann, um serligar umstøður tala fyri tí, víkja frá ásetingunum í hesum leiðreglum.

Stk. 2. Umsøkjarar geva, við at senda inn umsókn, samtykki til, at Tórshavnar kommuna kann almannakunngera, at stuðul er játtaður.

Stk. 3. Kommunan kann biðja umsøkjara, sum fær stuðul, um at lata kommununi frágreiðing við roknskapi, tá tiltakið er lokið.

Stk. 4. Møguligur ónýttur peningur skal rindast kommununi aftur.

Stk. 5. Álagt verður umsøkjarum, sum fáa stuðul, at tilskila á kunningartilfari og í viðkomandi samskifti í sambandi við verkætlanina, at Tórshavnar kommuna hevur veitt verkætlanini stuðul.

Stk. 6. Tað ber til at søkja um og fáa játtaðan stuðul til somu verkætlan úr fleiri stuðulstáttum.

Stk. 7. Hesar leiðreglur koma í gildi dagin eftir, at mentamálanevndin hevur samtykt tær.

*Soleiðis samtykt í mentamálanevndini tann 15. janaur 2025, dagført 11. februar 2026.*